**VINNUMÁLARÁÐIÐ**
RÁÐSSKRIVSTOVAN

# Søkt verður eftir fulltrúa til KT-fyrisiting

Vinnumálaráðið søkir eftir einum fulltrúa til KT-fyrisitingina.

KT- fyrisitingin tekur sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild, herímillum at røka uppgávur viðvíkjandi KT- trygd o.a.

**Starvið:**
KT-fulltrúin skal stjórna, samskipa og leggja til rættis KT-trygdarvirksemi hjá landsfyrisitingini sum heild, umframt at kunna aðalráð og allar stovnar um KT- trygdarmál.

Talan er um ein nýtt starv í eini rættiliga nýggjari fyrisiting, og skal tann sum settur verður tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta okkum av umsøkjarnum at teir hava:

- Hægri útbúgving so sum cand. It., cand. merc. (dat), KT-verkfrøðingur ella aðra viðkomandi hægri útbúgving.
- Kunnleika og royndir innan EDV og almenna ella privata fyrisiting.
- Góð samstarvsevnir
- Duga væl føroyskt, danskt og enskt.

**Vit bjóða**
Vit bjóða eitt fjølbroytt, spennandi og avbjóðandi starv í einum umhvørvi á høgum fakligum stigi, ið tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa. Til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við nógvum samskifti úteftir. Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har ið tú fert at arbeiða í tøttum samstarvi við politisku myndugleikarnar, áhugabólkar í samfelagnum og starvsfólkini hjá landsfyritøkuni. Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalráð.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

**Vinnumálaráðið**
Tinganes
Postsmoga 377
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. februar 2006. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Arna Poulsen, tlf. 356070.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Avloysari fyri dagrøktara

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir avloysara fyri dagrøktara í farloyvi í eitt ár at byrja tann 1. mars 2006.

**Vit ynskja at tú:**
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni
- Ert tolin og vísir umsorgan
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 8 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 40.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktarnir ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.

Arbeiðstíðin er ímillum kl. 7.30-17.15. Lønin er millum FA og FKA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøkt-arleiðara.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2006.

Vinarliga send umsókn tygara til

**Leirvíkar Kommuna**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

FØROYA LÆRARASKÚLI

# Tímalærari til Føroya Lærarskúla

Fyri lærara í farloyvi verður lýst eftir avloysara frá 15. februar og fram til 30. juni. Undirvísingin fevnir um

2 tímar í sálarfrøði í 2. flokki á læraraútbúgvingini
3 tímar í pedagogiskum serlestri í sama flokki og
2 tímar í pedagogiskum serlestri í 3. lærarskúla-flokki.

Førleikakrøvini eru viðkomandi prógv frá hægri lærustovni.

Løn eftir sáttmála millum Føroya Magistarafelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og c.v. skulu vera Føroya Lærarskúla, Postboks 348, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 15. februar á middegi.

Eru spurningar starvinum viðvíkjandi, eru áhugaðir umsøkjarar vælkomnir at seta seg í samband við Paula Nielsen, rektara, tlf. 313506 ella 225328
Telduatsetrið er paulini@flsk.fo

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*SERSTOVANDEILDIN*

# Pedagogur
## til Bústovnin og Sambýli á Rúnarvegi, Runavík

Undir Almanna- og heilsumálaráðnum og stovn-um undir tí við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, er eitt tænastumannastarv leyst at søkja frá 1. mars 2006.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar og vikuskiftisarbeiði.

Arbeiðið fevnir millum annað um at vegleiða búfólkið í øllum tí, sum tey hava tørv á, og at menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi.
At skapa trivnað og á ein pedagogiskan hátt tryggja búfólkunum menningarmøguleikar og saman við teimum finna útav, hvussu innihaldið í gerandisdegnum skal virka.

Dentur verðu rlagdur á, at tann ið sett/ur verður, hevur evni og vilja at samstarva og samskifta við avvarðandi hjá búfólkunum og við starvsfelagar, og er áhugað/ur at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum á arbeiðsplássinum og er opin fyri nýhugsan.

**Lønar- og setanartreytir:**
Tænastumannastarvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, og lønt stigini 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Nærri fæst at vita um starvið frá Oddfríðu Højgaard, leiðara á tlf. 226121.

**Umsóknarfreistin er 11. februar 2006 kl. 12.00.**

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

Bústovnurin á Rúnarvegi
Att: Leiðarin
Rúnarvegur 6
620 Runavík

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

Sosialurin
www.sosialurin.fo